## Tvær kvinnur í fjepparanevnd

Fjepparafelagið hjá KÍ, Bláa Bylgjan, hevur havt aðalfund, og fleiri av nevndarlimunum stillaðu ikki uppaftur. Og nú eru tvær kvinnur eisini komnar í nevndina. Eyðun Thorgeirsson er formaður, Bertha Klein Olsen næstforkvinna, og síðani eru Jóan Pauli Jacobsen, Heri Signar Nolsøe og Poula í Frammistovu nevndarlimir. Tiltakslimur er Símun Petur Zachariasen.



## B36 og HB ikki í kvinnudeildini

B36, sum so seint sum í 2005 vann steypakappingina hjá kvinnum, verður ikki við í bestu kvinnudeildini í ár, tí felagsliðið B68/NSÍ skal yvirtaka plássið hjá B36 í 1. deild hjá kvinnum. Tað skrivar heimasíðan hjá B68, sum veit at siga, at HB fekk í boði at flyta upp í 1. deild kvinnur, men felagið tók ikki av tilboðnum. Síðani fekk liðið hjá toftafólki og runavíkingum tilboðið, og har tóku tey av.

Højgaard, av teimum bestu, sum megnaði at skjóta oman fyri 530 stig, ið seks skjúttar vanliga burdu klárað.

Næstur honum var Absalon Hansen og honum á baki kom Eirikur í Jákupsstovu.

Annika Vang og Jógvan Magnus Andreasen høvdu eina skjóting, ið var út av lagi tilsamans, men í seinnu helvt var Jógvan Magnus Andreasen millum tey bestu.

### Fjórðingsfinalur

Vanliga verður ikki gjørt nakað við áttandapartsfinalurnar, men tað skal nevnast, at unga Sirið Rein mundi vunnið á Anniku Vang í henni. Eftir 12 pílar høvdu báðar tvær 101 stig, men í umskjótingini tók Annika Vang seg saman, og fekk tíggju stig, meðan Sirið Rein fekk níggju.

Í fjórðingsfinalunum vunnu bæði Eirikur í Jákupsstovu og Hans Petur Højgaard sínar dystir, og hetta var væntað av teimum. Hóast Hans Petur bert vann við tveimum stigum.

Hinir dystirnir vóru hópin áhugaverdari, tá talan var um rímiliga javnar skjúttar til hesar dystir.

Absalon Hansen og Jógvan Magnus Andreasen skutu ein dyst. Har leikaði javnt á, men tá alt kom til alt, vísti tað seg, at Jógvan Magnus Andreasen hevði kaldara blóðið og vann við heil sjey stigum.

Í hinum dystinum gjørdi Torfinn Hansen, ársins skjútti, bart, og sendi Anniku Vang so barlanga úr kappingini, tá hann vann við seks stigum.

### Hálvfinalur

Jógvan Magnus Andreasen vísti sterka skjóting í fjórðingfinaluni, og í hálvfinaluni skuldi hann møta Eiriki í Jákupsstovu. Teir báðir hava skotið nógvar dystir ímóti hvørjum øðrum í vetur, og hava mestsum skiftst at vinna. Kalda blóðið hjá Jógvani Magnus Andreasen var ikki líka kalt longur, og tað hevði helst við sær, at hann ikki fekk sína skjóting veruliga at koyra.

Tá alt kom til alt endaði hesin intensi dysturin við, at Eirikur í Jákupsstovu vann við níggju stigum.

Í hinum dystinum skutu Torfinn Hansen og Hans Petur Højgaard. Henda dyst vann Hans Petur Højgaard við 111 stigum ímóti 95.

### Finalur

Í bronsudystinum hittust skjúttarnir úr Vágaskoti, Torfinn Hansen og Jógvan Magnus Andreasen. Teir vístu góða og javna skjóting, og endin varð, at Torfinn Hansen vann dystin við einum stigið.

Gulldysturin gjørdist eisini rímiliga javnur. Hans Petur Højgaard fór beinanvegin eitt stig fram um, og soleiðis helt fram til seinasta umfar, tá munurin varð fýra stig. Eirikur í Jákupsstovu royndi sítt frægasta, men tað var ikki nóg mikið, og so vann Hans Petur Højgaard við trimum stigum, og er tí føroyameistari í recurve. Leggjast kann til merkis, at bronsudysturin hevði meira stig enn gulldysturin.

at Torfinn Hansen var besta boðið til ein ársins skjútta í ár.

**eij.**



*Torfinn Hansen úr Vágaskoti varð av bogaskjótideildini valdur til ársins skjútta fyri sítt arbeiði bogaskjóting at frama*

# HB var best í Klaksvík

**HB vann greitt á bæði EB/Streymi og KÍ, áðrenn Fróði Benjaminsen kundi staðfesta, at Klaksvíkssteypið skal standa í HB-húsinum komandi árið**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



*Jógvan Skorheim, varaborgarstjóri í Klaksvík, handar liðformanninum hjá HB, Fróði Benjaminsen, Klaksvíkssteypið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í nógva vindinum og kuldanum kundi Fróði Benjaminsen, liðskipari hjá HB, seinnapartin í gjár taka ímóti Klaksvíkssteypinum. Tað var greitt, eftir at høvuðsstaðarfelagið leygardagin hevði bast greipuvinnarunum frá í fjør og sunnudagin í finaluni koppaði vertunum úr Klaksvík.

Klaksvíkskappingin, sum KÍ skipar fyri árliga, er vorðin fastur táttur av fótbóltsárinum. Dystirnir vóru avgreiddir á Injector Arena um vikuskiftið, og tað merktist, at fólk gleða seg til kappingarárið, sum stendur fyri framman.

### HB basti meistarunum

Liðini løgdu til brots leygardagin, tá HB og EB/Streymur hittust. Hóast Bárður Olsen legði sundalagsmenn á odda við brotssparki í fyrra hálvleiki, eydnaðist teimum reyðu og svørtu at vinna seg í finaluna. Við málum frá Rógva Poulsen, Andrew av Fløtum og Christian Mouritsen tryggjaði HB sær pláss í finaluni. Hóast størsti áhugin var fyri enska stórdystinum millum Manchester United og Liverpool, høvdu fólk leitað sær á Injector Arena.

### B36 misnýtti øll

Seinni á degnum tóku vertirnir úr Klaksvík ímóti B36. Tíðliga í dystinum varð framherjin á heimaliðnum, Adrian Joensen, útvístur eftir nærdyst við Herbert í Lon Jacobsen. Men í undirtali stríddust klaksvíkingar væl, og tað gav úrslit, tá Kristoffur Jakobsen legði KÍ á odda í fyrra umfarinum. Gestirnir úr høvuðsstaðnum trýstu í seinnu hálvleiki, og við fáum minuttum eftir av dystinum javnaði Høgni Eysturoy úr stuttari fjarstøðu.

Brotssparkskappingina vann KÍ við trimum málum ímóti ongum. Fróði Clementsen, Jákup á Borg og Bogi Hermansen raktu ikki málið úr 11 metrum, og so var KÍ í finaluni.

### Sundalagsmenn greitt omaná

Dystin um triðja plássið, sum varð í gjár, vann EB/Streymur greitt. Sundalagsmenn vunnu heili 5-1 móti B36. Tað eydnaðist millum annað Alex José Dos Santos at koma á máltalvuna móti sínum fyrrverandi liðfeløgum, tá brasilumaðurin økti til 3-1.

Hans Pauli Samuelsen við tveimum og Bárður Olsen og Leif Niclasen við hvør sínum, stóðu fyri hinum málunum.

### Uppiborin sigur

HB vann uppiborið finaluna móti klaksvíkingum. Fróði Benjaminsen legði eftir lítlari løtu gestirnar á odda, og løtu seinni økti Rasmus Nolsøe við beinleiðis frísparki. KÍ hótti ongantíð leiðsluna hjá teimum reyðu og svørtu, og um fimmtíðina kundi HB-leikararnir fróast um Klaksvíkssteypið.

Tað er ikki altíð, at úrslitini í hesu árligu kappingini í Klaksvík eru eftirfarandi. Men við støði í avrikunum hjá HB, verða teir reyðu og svørtu helst ein av avbjóðarunum til FM-heitið.

## Úrslitini

**Dystirnir leygardagin**
**HB-EB/Streymur 3-1 (1-1)**
**0-1** Bárður Olsen, brotsspark
**1-1** Rógvi Poulsen
**2-1** Andrew av Fløtum, brotsspark
**3-1** Christian Mouritsen

**KÍ-B36 1-1 (1-0)**
**1-0** Kristoffur Jakobsen
**1-1** Høgni Eysturoy
(KÍ vann brotssparkskappingina)

**Dystirnir sunnudagin**
Dysturin um triðja plássið
**EB/Streymur-B36 5-1 (2-0)**
**1-0** Hans Pauli Samuelsen
**2-0** Hans Pauli Samuelsen
**2-1** Klæmint Matras, brotsspark
**3-1** Alex José Dos Santos
**4-1** Bárður Olsen
**5-1** Leif Niclasen

**Finalan**
**KÍ-HB 0-2 (0-2)**
**0-1** Fróði Benjaminsen
**0-2** Rasmus Nolsøe